# Týsdagur 12. juli

BOGASKJÚTTARNIR vinna trý gullmerki og eitt bronsumerki í FITA-skjótingini. Liðini í recurve og compound vinna gull, og Jógvan Niclasen vinnur gull í compound, har bert eitt stig skilir hann og tveir teir næstu skjúttarnar. Sigrid K. Vang vinnur bronsu.

RANDI KÚRBERG verður nummar 5 í hamkasti.

BOGI LENVIG vinnir spurtin um fjórða plássið í 5.000 metra renningini. Jóan Karl Joensen rennur finaluna í 800 metra kappingini, og hann endar sum nummar 6.

AKSEL POULSEN spælir seg heilt fram í finaluna í einmansleikinum í badminton. Ragnar Rasmussen tapir sína hálvfinalu. Kvinnurnar koma ikki langt í kappingini.

FØROYAR vinna 3-0 í kvinnulandsdystinum ímóti Bermuda, og so var eingin ivi um, at føroyska liðið var á veg móti gullinum. Rannvá Andreassen skorar tvey og Vivan Bjartalíð eitt.

SKJÚTTARNIR Eirikur Elisson og Gunnar Joensen enda sum nummar 10 í liðkappingini í sporting.

SVIMJILANDSLIÐIÐ vinnur bronsu í stafettunum hjá kvinnum og monnum. Elspa Mørkøre og Jutta Thomsen vinna eisini hvør sítt bronsumerki í finalunum týskvøldið.

SEINASTU innleiðandi dystirnir í flogbólti verða spældir. Kvinnurnar vinna tryggan 3-0 sigur á Álandi, og menninir vinna um morgunin 3-0 á Orkney og vissa sær um kvøldið fyrsta plássið í bólkinum við 3-1 sigri á Álandi.

AÐALFUNDURIN í IGA ger av, at Áland skal verða vertur fyri Oyggjaleikunum í 2009. Somuleiðis verður gjørt av, at Minorca verður 25. og seinasta oyggin, sum sleppur upp í Oyggjaleikirnar.

ENDALIGA avgerðin um, hvørjar ítróttargreinar verða við á Rhodos verður tikin, og hvørki badminton ella fimleikur fáa innivist. Hinvegin sleppur judo upp í part aftur.



*Bermuda var nýggja fótbóltsliðið á Oyggjaleikunum, og tær góvu føroyska liðnum góða mótstøðu*




*Føroysku svimjararnir vinna fleiri heiðursmerki í stafettsvimjingunum*



*Sterkasti føroyski borðtennisspælarin fegnast um ein sigur í kappingini*




*Bogi Lenvig legði seg á odda tíðliga í 5.000 metra renningini, men hann dragnaði og endaði sum nummar 4.*



*Schandorff tekur frá og leggur afturat, tá ið støðan í bogaskjótingini skal gerast upp*



*Tað gongur lívliga fyri seg, tá ið flogbóltskvinnurnar spæla ímóti Álandi*




*Jón Nielsen ger alt fyri at fáa fatur á einum bólti*